– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Dámlig tvíhús í Tórshavn

**Húsini standa væl fyri í vesturbýnum**









## Fyrsta fatanin

Tú koyrir inn í hugnaligu gøtuna á Teigi. Tú sneiðir inn í gøtuna og merkir alt fyri eitt tætta, heimliga og barnavinarliga umhvørvið beint uttan fyri hurðina. Húsini standa við blindan veg. Har er friðarligt, veðurgott og allir hugsandi stovnar eru nær við. Nakað av útsýni er av loftinum, og snøggur garður/urtagarður er uttanum. Eisini er stór garaga og hjallur.

## Ljós og luft – stílur og snið

Komin inn um hurðina fært tú somu fatan. Góðska og dygd er sett høgt, og litirnir eru ljósir. Fert tú upp lættgongdu trappurnar, kemur tú til eina væl innrættaða og gagnnýtta hædd. Har er hjúnarúm, baðirúm við baðikari og 2 kømur. Fert tú inn í stovuna, møtir tú einum stórum rúmi við stórum vindeygum. Tú kennir teg ikki innilokaðan á nakran hátt, men tvørturímóti sum ein part av grannalagnum, umhvørvinum. Alt er ljóst, svalligt og lætt. Gólvini eru úr góðum tilfari, og køkurin er ljósur, arbeiðsligur og handligur. Niðasta hædd er eisini øll innrættað.

## Innan

Í miðhæddini er inngongd, durur, baðirúm, køkur / stova, bryggers. Í ovastu hædd er trappugongd, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, baðirúm, 2 kømur, stova og vaskirúm / fýrrúm.

## Fakta

**Adressa** ...........á Teigi 5, Tórshavn
**Byggiár** ............1988
**Hæddir**.............3
**Gólvvídd**...........225 m² búøki
**Grundøki**..........300 m²
**Bilhús**...............Ja
**Hjallur** ..............Ja
**Prísuppskot** ....kr. 2.150.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**